## Semja um Kaliningrad

Russland og ES samdust á fundi í Bruxelles mánadagin um, hvussu fólk í geiranum Kaliningrad skulu ferðast til Russlands, eftir at Póland og Litava eru vorðin limir í ES. Kaliningrad liggur millum tey bæði londini og kemur tí at liggja inni í ES-øki.

ES hevði kravt, at fólk í Kaliningrad, sum ætlaðu sær til Russlands, skulu hava eitt serligt ferðaloyvi, men tí kravinum hevur samveldið slept. Ístaðin skulu fólk hava eitt ferðaskjal, sum gevur teimum heimild at ferðast ígjøgnum Litava og Póland uttan eftirlit.

Á fundinum í Bruxelles tosaðu partarnir eisini um at gera eina jarnbreyt úr Kaliningrad ígjøgnum Litava til Russlands. Semja var um, at verður ein tílík jarnbreyt gjørd, verður tað ikki neyðugt hjá fólki í Kaliningrad at hava ferðaskjal, skulu tey til Russlands at ferðast.

## Letur grunni lønina

Svenski innflytararáðharrin, Jan O. Karlsson, hevur nú gjørt av at lata sína ráðharraløn fara í Grunnin til minnis um Olof Palme.

Ráðharrin hevur verið fyri nógvum ágangi í seinastuni, tí tað kom fram, at hann fær tvær mánaðarlønir. Onnur lønin er ráðharralønin, sum er 43.000 svenskar krónur um mánaðin, og hin er ein løn frá ES, sum er 80.000 krónur um mánaðin. Hesa lønina fær Jan O. Karlsson, tí hann undan sínari ráðharratíð var ein av teimum ovastu embætismonnunum hjá ES.

Jan O. Karlsson hevði ætlað at lata ráðharralønina fara í minnisgrunnin, men tað kann hann ikki gera, sigur grannskoðararætturin í Luxenbourg. Rætturin sigur, at Jan O. Karlsson kann ikki siga ES-lønina frá sær, og hann kann heldur ikki geva hana burtur. Tí valdi ráðharrin at lata sína ráðharraløn fara í Grunnin til minnis um Olof Palme.

## Flýddu í flogfari

Kubanski flogskiparin Nemecio Alonso setti mánadagin alla sína familju upp í eitt lítið flogfar og setti síðani kós ímóti USA. Amerikanska radarskipanin varnaðist tað lítla flogfarið og sendi jagaraflogfør at fylgja tí, til tað setti seg í Florida.

Flogfarið er av russiska slagnum Antonov-2 og er meiri enn 60 ára gamalt. Tað hevur bert sæti til flogskiparan og trý ferðafólk, men kortini eydnaðist tað Nemecio Alonso at hava sjey fólk við sær á ferðini til USA.

Kubansku myndugleikarnir hava biðið um at fáa bæði flogfarið og tey átta fólkini aftur. Hildið verður, at teir fáa tað gamla flogfarið, men tey átta fólkini fáa uppihaldsloyvi í USA.

## Gates ímóti AIDS

Microsoft-stovnarin Bill Gates hevur gjørt av at lata góðar 700 milliónir krónur til stríðið ímóti HIV og eyðkvæmi í India.

Bill Gates kunngjørdi sjálvur avgerðina mánadagin, tá hann var í India. Stuðulin er tann størsti, sum eitt einstakt land hevur fingið úr grunninum, sum Bill Gates og kona hansara Melinda hava stovnað.

Umleið 20 prosent av verkfrøðingunum, sum arbeiða hjá Microsoft, eru indarar, og Bill Gates hevur sagt, at fyritøkan hevur stóran áhuga í landinum. Hildið verður, at umleið fýra milliónir indarar hava HIV-smittuna, og metingar siga, at talið kann koma upp í 20 milliónir í 2010.

# Irakska tingið segði nei

**Tjóðartingið í Irak sýtti í gjár fyri at góðkenna krøvini frá ST. Nú verður bíðað eftir, hvat Saddam Hussein sigur**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Tjóðartingið í Irak samtykti í gjár einmælt at vísa aftur krøvunum frá trygdarráðnum hjá ST um, at landið skal lata seg avvápna, og at vápnaeftirlitsmenninir hjá ST skulu hava frítt at fara í landinum. Ein talsmaður hjá tinginum segði aftan á atkvøðugreiðsluna, at avgerðin var í samsvari við viljan hjá irskska fólkinum.

Tingið samtykti samstundis, at Saddam Hussein, forseti skal taka ta endaligu avgerðina um ST-krøvini. ST hevur kravt at fáa endaligt svar úr Bagdad í seinasta lagi fríggjadagin.

Elsti sonur Saddams Hussein, Uday, hevði annars mælt tjóðartinginum til at góðkenna krøvini hjá ST. Í einum brævi til tjóðartingið skrivaði hann, at tingið átti at góðkenna kravið um, at landið verður avvápnað, og at eftirlitsmenninir hjá ST fáa frítt at fara.



*Limir í irakska tjóðartinginum við samtyktini hjá ST-trygdarráðnum. Aftan á orðaskiftið samtykti tingið einmælt at hava krøvunum hjá ST og at lata Saddam Hussein, forseta taka ta endaligu avgerðina*

# Brøður skipaðu fyri bumbuspreinging

**Løgreglan í Indonesia vil vera við, at tríggir brøður skipaðu fyri bumbuspreingingini á Bali. Ein teirra er tikin**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Í síðstu viku tók løgreglan í Indonesia ein mann, sum síðani er skuldsettur fyri at hava verið høvuðsmaðurin aftan fyri bumbuspreingingina á Bali, har meiri enn 180 fólk lótu lív.

Í gjár kunngjørdi løgreglan, at hon er farin at leita eftir tveimum brøðrum hjá tí handtikna manninum. Løgreglan heldur, at teir báðir vóru eisini uppi í spreingingini, men fyribils verða teir skuldsettir fyri at hava brotið vápnalógina.

Talsmaðurin hjá løgregluni segði í gjár, at teir báðir brøðurnir verða væntandi tiknir um stutta tíð. Hann vildi tó ikki siga, um løgreglan veit, hvat teir fjala seg.

# Mæla til felags ríki á Kýpros

**ST er nú komið við einum uppskoti, sum skal loysa ta drúgvu kreppuna á Kýpros. Uppskotið mælir til felags ríki við felags stjórn, men við tveimum landslutum, sum skulu hava ávíst sjálvsstýri**

KÝPROS
*Árni Joensen:*

Eftir uppskotinum skulu teir báðir landslutirnir skipast eftir sama leisti sum landslutirnir í Sveits. Tað fer at bera í sær, at landslutirnir fáa rættiliga víðfevnt sjálvsstýri.

At ST hevur lagt uppskotið fram júst nú kemst av, at á toppfundinum í Keypmannahavn í næsta mánað fer ES væntandi at bjóða miðjarðarhavsoynni limaskap í samveldinum.

Eftir uppskotinum skulu grikkarnir og turkarnir á Kýpros velja eitt forsetaráð við seks limum, sum skal virka sum tað ovasta útinnandi valdið í felags ríkinum. Teir báðir fólkabólkarnir skulu skiftast um at hava forsetan og varaforsetan, og skift verður tíggjunda hvønn mánað. Sjálvt býtið í forsetaráðnum verður eftir fólkatalinum í teimum báðum fólkabólkunum.

Uppskotið er latið stjórnunum í Grikkalandi og Turkalandi, leiðarunum hjá grikkum og turkum á oynni umfram bretsku stjórnini, tá Kýpros er fyrrverandi bretskt hjáland. Trygdarráðið hjá ST fekk uppskotið fyrrakvøldið.

Kýpros hevur verið býtt sundur millum grikkar og turkar, síðani Turkaland hersetti tann norðara partin av oynni í 1974. Umleið ein fimtingur av fólkinum á oynni eru turkar, men teir hava valdið í einum triðingi av oynni. Turkaland hevur lýst tann norðara partin sum sjálvsstøðugt ríki, men bara Turkaland sjálvt hevur viðurkent tað.

Turkiska stjórnin hevur hótt við at innlima norðara partin av oynni í sjálvt Turkaland, fær tann grikski parturin limaskap í ES. Hinvegin hevur Grikkaland hótt við at nýta sýtingarrættin í ES, fær oyggin ikki limaskap í samveldinum.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, vónar, at teir báðir gomlu politisku leiðararnir á Kýpros, tann grikski Glafkos Klerides og tann turkiski Rauf Denktash, kunnu fara til samráðingarborðið um at loysa ta skjótt 30 ára gomlu kreppuna.



# Stór hárfríðkanarmessa í London

**Seinast í oktobur fóru 22 hárfríðkanarkvinnur úr Føroyum til London á Salong International messuna, sum er um heystið á hvørjum ári. Flest øll kend merki innan hárrøkt eru at finna á framsýningini, har nærum alt, ein frisørur kann hugsa sær, er at fáa - líka frá hárnálum til hárvaskimaskinur**

HÁR OG MÓTI
*Rúna Sivertsen*



*Tær 22 hárfríðkanarkvinnurnar, sum seinasta vikuskiftið í oktobur fóru á stóru Salong International framsýningina í London. Myndin er tikin á flogvøllinum áðrenn fráferðina.*
*(Mynd: Sørin Pram Sørensen)*



*Ein sjeikur úr London. Nú eru tað ikki longur bara kvinnur, ið kunnu royna ymisk hársnið. Nei, nú tora mannfólkini eisini at lita sær, um tað skal vera. Henda spennandi harrafrisuran var millum tær mongu, ið vóru at síggja á framsýningini*
*(Mynd: Vera Larsen)*

Salong International varð í ár hildin í nýggja handilssentrinum, Exel, sum liggur miðskeiðis í London.

Umframt básar við øllum tí, ein hárfríðkanarstova hevur brúk fyri, vóru eisini sýningar hildnar á ymisku básunum. Fleiri kendar salongir vóru millum framsýnararnar, so sum Tony and Guy og Vidal Sasson, ið flestu frisørar kenna,

Sosialurin hevur tosað við eina av teimum 22 hárfríðkanarkvinnunum, Veru Larsen úr Klaksvík, sum var við á framsýningini.

- Har fæst alt, tú kanst hugsa tær, m.a. ein vaskimaskina til hár. Kundin leggur høvdið inn í vaskimaskinuna, og hárið verður vaskað, uttan at frisørurin hevur fyri neyðini at røra hárið, sigur hon.

Vera sigur, at eftir ein slíkan túr, kemur tú aftur til arbeiðis við nýggjari inspiratión.

– Eg keypti ein videofilm, har vístur verður lit- og klippiteknikkur. Hann ætli eg at nýta til eitt hugna- og skeiðkvøld saman við frisørunum á mínari salong, sigur Vera.

– Sunnukvøldið fóru vit á eina sýning í kenda bygninginum, Albert Hall, har 18 teir kendastu hárskerararnir í heiminum sýndu síni kynstur, m.o. Patrick Cameron, greiðir Vera frá.

Á sýningini í Albert Hall, var peningur savnaður til sjúk børn. Innsavningin gav 7,1 milj. pund. Tey 4 milj. Hvørt ár verður savnað inn til vælgerandi endamál á hesi sýning til frama fyri sjúk og børn í trongum korum.

### Skriktar upp á nátt

Vera sigur, at tær sjálvsagt nýttu høvi at síggja nakað av London, fyri ikki at gloyma “shoppingtúrin” eftir Oxford Street.

Tær 22 hárfríðkannarkvinnurnar vóru í London júst tað vikuskiftið, tá klokkan varð flutt til vetrartíð. Men eyka tíman, tær ætlaðu at sova í, mistu tær, tí mitt á náttini fór eldávaringin í gongd, og tær máttu allar út á gøtuna at standa.

Tíbetur vísti tað seg at vera “falskur alarmur” og eftir eina løtu í náttarkuldanum, kundu tær allar fara undir fjararnar aftur.

Longu nú ber til at bíleggja atgonguseðil til Salong International komandi ár. Atgonguseðilin er bíligari at keypa nú, enn beint uppundir framsýningina.

Kostnaðurin liggur um 300 kr. fyri ein dag á messuni.



*Í langa tíð hava langir ella heilt stuttir fruntar verið móti. Men nú sær út til, at tungu fruntarnir, ið ganga langt aftur móti oyrunum, aftur gerast móti*
*(Mynd: Vera Larsen)*

